## FSF bíðar ikki longur

Fríggjadagin avgjørdi kappingarnevndin hjá FSF, at dysturin í kappingini um Løgmanssteypið millum EB/Streym og VB/Sumba skal spælast mikukvøldið. Hetta er annars dysturin, sum nú hevur bíðað í skjótt 100 dagar, tí enn er endalig greiða ikki fingin á málið um spæliloyvið hjá Páll M. Joensen hjá HB.
Enn er tað málið ikki viðgjørt av ítróttardómstólinum, men hetta er tó ikki nakað, sum FSF sigur seg vera sinnað at bíða eftir. Ikki minst, tí finalan í steypakappingini skal spælast á ólavsøku, og tey tí vilja hava dystin avgreiddan.

**-mørk**

# Eingin viðgerð fyrstu tríggjar vikurnar

Anja Hovgaard, forkvinna Ítróttardómstólinum, sigur við Útvarpið, at talan verður neyvan um nakra viðgerð av HB-málinum fyrstu tríggjar vikurnar. Hetta tí dómstólurin ikki er fullmannaður, nú feriutíð er.

So er spurningurin, hvørt talan verður um viðgerð, tá komið er út í hálvan juni mánað. Tá eru dagarnir fram móti ólavsøku vorðnir somikið fáir, at verður talan um úrskurð, sum gongur ímóti kappingar- og dómsevndini hjá FSF, verður púrasta vónleyst at finna fram til finaluluttakararnar, áðrenn komið er fram til ólavsøkuna, har steypa-finalan vanliga er fastur táttur.

**-mørk**

# Undarlig kensla í Runavík

NSÍ venjarin stóð við undarligari kenslu, tá ið stríðið var lokið. Undan ferðini til Gøtu hevði hann einki havt ímóti at vinna eitt stig. Hann hevði trý á kontini, men misti tvey í evstu løtu.

– Tað sveið hjá okkum, at teir fingu mál, tá ið so lítil tíð var eftir. Sæð yvir allar 90 minuttirnar er tað ivaleyst í lagi, at vit fáa eitt stig í part. Vit høvdu ilt við rættuliga at koma fyri okkum. Tíðliga í 2. hálvleiki hava teir góðan møguleika, sum ikki gevur mál. Tá vakna okkara av álvara, vit fáa eitt mál, og vit høvdu møguleikar at økja um leiðsluna. Málverjin bjargar væl, og í einstøkum støðum taka spælararnir skeivar avgerðir, tá ið teir eru fýra ímóti tveimum, sigur Trygvi Mortensen.

**-jh**

# Hetta er at liva við

GÍ veteranurin Magni Jarnskor helt, at úrslitið var at liva við.

– Vit áttu at havt lagt okkum framum við einum ella tveimum málum. Men vit vóru ikki nóg avgjørdir frammanfyri málinum, og Jens Martin Knudsen stóð seg sera væl. Hann var eisini heppin, tá ið Gunnar Nielsen rakti í høvdið á honum, heldur Magni Jarnskor.

Veteranurin heldur, at tá ið teir ikki megnaðu at gera ivaleyst í lagi, ... mál, tá ið teir høvdu yvirvág og málmøguleikar, so kunnu teir ikki vera annað enn nøgdir, at tað kortini eydnaðist at fáa eitt mál og eitt stig. NSÍ var omaná góða løtu í 2. hálvleiki, og tá høvdu teir møguleikar at gera fleiri mál enn tað eina, sum teir fingu. Tá ið vit so koma afturíaftur og fáa mál í yvirtíðini, so kennist tað næstan sum um, at vit vunnu eitt stig í staðin fyri at missa tvey, heldur Magni Jarnskor.

**-jh**

# Niclas heldur fram í Gøtu

Niclas Niclasen hevur staðið seg væl í GÍ miðverjuni, síðani hann fyrr í ár flutti úr Klaksvík og KÍ og til GÍ og Gøtu.

Nú boðar GÍ heimasíðan frá, at teir í Gøtu eru so mikið væl nøgdir við samstarvið við verjuspælaran úr Klaksvík, at teir hava boðið honum at halda fram næsta ár, og Niclas hevur tikið av. Harvið er greitt, at Niclas Niclasen eisini í 2007 verður GÍ spælari.

**-jh**

